**Leiðbeining til lærarar**

# Landafrøði

**C-stig - B-stig**

Krøvini til lærugreinina landafrøði C-stig - B-stig eru ásett í námsætlanini í landafrøði og í støðisnámsætlanini. Í hesi leiðbeiningini eru frágreiðingar um nøkur av hesum settu krøvum. Sitat úr galdandi námsætlanum eru markað við skákskrift.

## Tilhoyrandi skjøl

- Námsætlan – landafrøði 7-B
- Støðisnámsætlan
- Leistur – eftirmeting og afturboðan
- Leistur – ársætlan fyri lærugrein
- Leistur – undirvísingargongd

# Innihaldsyvirlit

1. Kjarnaøki ... 3
1.1. Arbeiðshættir í landafrøði ... 3
1.2. Jarðfrøði ... 4
1.3. Veður og veðurlag ... 5
1.4. Fólkatalsfrøði og lendisumsiting ... 6
1.5. Havfrøði ... 6
2. Førleikar ... 8
2.1. Faklig førleikamál – modelleringsførleikar ... 8
2.2. Faklig førleikamál – empiriførleikar ... 9
2.3. Faklig førleikamál – førleikar at miðla ... 10
2.4. Faklig førleikamál – førleikar at seta í frásjón ... 10
3. Eftirmeting og próvtøka ... 11
3.1. Eftirmeting og afturboðan ... 11
3.2. Støðumet, ársmet og royndarmet ... 11
3.3. Munnlig próvtøka á C-stigi ... 11
3.3.1. Dømingargrundarlag – munnlig próvtøka ... 13
3.3.2. Próvtalslýsing – munnlig próvtøka ... 13
3.4. Munnlig próvtøka á B-stigi ... 14
3.4.1. Dømingargrundarlag – munnlig próvtøka ... 15
3.4.2. Próvtalslýsing – munnlig próvtøka ... 16

# 1. Kjarnaøki

*Landafrøði á C-stigi hevur fýra ymisk kjarnaøki. Økini umskarast og virka fyri ein stóran part saman í undirvísingini.*

- *Arbeiðshættir í landafrøði*
- *Jarðfrøði*
- *Veður og veðurlag*
- *Fólkatalsfrøði, lendisumsiting og burðardygg menning*

*Landafrøði á B-stigi hevur fimm ymisk kjarnaøki. Økini umskarast og virka fyri ein stóran part saman í undirvísingini.*

- *Arbeiðshættir í landafrøði*
- *Jarðfrøði*
- *Veður og veðurlag*
- *Fólkatalsfrøði og lendisumsiting*
- *Havfrøði*

*Landafrøði C-B*

Kjarnaøkini umskarast, soleiðis at skilja, at flestu tekstir og arbeiðshættir hava eyðkenni frá meira enn einum kjarnaøki. Tískil verður fyri tað mesta arbeitt á fleiri kjarnaøkjum samstundis, hóast denturin kann liggja á ávísum kjarnaøki.

## 1.1. Arbeiðshættir í landafrøði

<table>
<tr><th>C-stig</th><th>B-stig</th></tr>
<tr><td colspan="2">- Kort<br>- Hagtøl, figurar og modell<br>- Feltarbeiði og royndir<br>- Náttúruvísindaligur arbeiðs- og hugsanarháttur<br>- Økisgeografi og globalisering</td></tr>
</table>

*Landafrøði C-B*

Arbeiðshættirnir í landafrøði geva næmingunum førleikar at savna, greina og miðla geografiska vitan við støði í bæði ástøðiligum og praktiskum arbeiði.

Við kortlæru læra næmingarnir at kenna ættirnar, breiddar- og longdarstig, har eisini stutt verður komið inn á kortprojektiónir. Arbeitt verður við ymiskum kortsløgum — topografiskum, tematiskum og politiskum kortum og veðurkortum. Á B-stigi skulu næmingarnir eisini duga at skitsera kort.

Næmingarnir læra at lesa tabellir og figurar, lesa og greiða frá landafrøðiligum modellum og seta upp og tekna grafar. Dentur verður lagdur á at skilja, hvussu dátur lýsa broytingar í náttúru og samfelag.

Feltarbeiði verður nýtt til at knýta ástøði og veruleika saman. Næmingarnir fara út at eygleiða landslagið, máan, veður og samfelagslig mynstur. Í sambandi við fólkatalsfrøði kunnu tey eisini arbeiða við, hvussu bygdir og býir eru broytt gjøgnum tíðina, og hvussu landslag og bygningar vísa samfelagsliga menning.

Dentur verður eisini lagdur á at arbeiða við økisgeografi og globalisering, har næmingarnir kanna samanhangir bæði lokalt, regionalt og globalt. Her læra tey at brúka kort, dátur og dømi til at lýsa og samanbera lond, landslutir og heimspartar, og at skilja, hvussu globalar tilgongdir, t.d. handil, búskapur, fólkaflytingar og veðurlagsbroytingar, ávirka lokal øki og umvent.

Náttúruvísindaligur arbeiðs- og hugsanarháttur er ein reyður tráður í arbeiðinum. Næmingarnir læra at seta fram spurningar, savna inn og viðgera dátur, tulka úrslit og seta tey í fakliga frásjón. Hetta styrkir førleikan at arbeiða skipað, kritiskt og sjálvstøðugt við landafrøði sum fakøki.

## 1.2. Jarðfrøði

| C-stig | B-stig |
|---|---|
| - *Jarðarsøgan og jarðarinnar upphav*<br>- *Uppbyggjandi máttir, m.a. eldgos, hot-spots og plátutektonikkur og avleiðingar av hesum*<br>- *Niðurbrótandi máttir, m.a. máan av ísi og regni og avleiðingar av hesum*<br>- *Skapan av ymiskum grótsløgum*<br>- *Lívrunnar orkukeldur*<br>- *Ráevnavinna* | - *Jarðarsøgan og jarðarinnar upphav*<br>- *Eldgos og plátutektonikkur*<br>- *Máan av ísi og regni*<br>- *Skapan av ymiskum grótsløgum*<br>- *Lívrunnar orkukeldur*<br>- *Ráevnavinna* |

*Landafrøði C-B*

Í undirvísingini verður jarðarsøgan lýst – frá at jørðin verður til og fram til okkara tíð. Komið verður inn á ymsu jarðfrøðiligu tíðarskeiðini og menningina av lívi, herímillum stutt gjøgnumgongd av ávirkanini av katastrofum, skiftandi umhvørvi og skiftandi umstøðum fyri lívi.

Samansetingin av jørðini, lithosferan, verður gjøgnumgingin og sett í samband við m.a. trykkgradientin og tilstandsformarnar: fast evni, flótandi evni og gass. Plátutektoniska modellið og ávirkanin av pláturørslum á landslagsformar, jarðskjálvtar og eldgos og ymisk sløg av gosfjøllum verða lýst. Føroyska jarðfrøðin verður lýst og sett í samband við omanfyristandandi.

Á B-stigi verður størri dentur lagdur á máan, erosión og ávirkanina á landslagið, serliga á máan av ísi, vatni og vindi í føroyska landslagnum.

Sedimentert, metamorft og magmatiskt grót og umstøðurnar, hesi verða til undir, verða lýst. Tey ymisku sløgini av gróti verða m.a. sett í samband við føroysku jarðfrøðina.

Komið verður inn á grundleggjandi treytirnar fyri skapanina av lívrunnum orkukeldum, herímillum serliga fossilum brennievni. Ávirkanin á okkara samfelag og umhvørvi verður eisini viðgjørt í hesum sambandi.

Í sambandi við ráevnavinnu kann komið vera inn á, hvussu lívrunnin fossil brennievni og mineralir verða nýtt í okkara samfelag.

## 1.3. Veður og veðurlag

| C-stig | B-stig |
|---|---|
| - *Orkujavnvág jarðarinnar*<br>- *Veðurskipanir á jørðini við dømum um økistongdar og staðbundnar veðurskipanir, herímillum hvussu havið ávirkar hesar*<br>- *Vistfrøðiskipanir*<br>- *Fyritreytir fyri lívi og landbúnaði ymsastaðni á jørðini*<br>- *Varandi orkukeldur*<br>- *Mannaelvd ávirkan á landslagið* | - *Orkujavnvág jarðarinnar*<br>- *Veðurskipanir á jørðini*<br>- *Veðurlagsmunir ymsastaðni á jørðini*<br>- *Vistfrøðiskipanir*<br>- *Fyritreytir fyri lívi og landbúnaði ymsastaðni á jørðini*<br>- *Varandi orkukeldur*<br>- *Mannaelvd ávirkan á landslagið* |

*Landafrøði C-B*

Ávirkanin av innstrálingini frá sólini og útstrálingini frá jørðini á orkujavnvágina verður lýst. Í hesum sambandi verður komið inn á samansetingina av atmosferuni og havstreymar. Yvirskipaða veðurlagsskipanin á jørðini, herímillum hátrýst og lágtrýst, corioliseffektin, slag av avfalli og fastlands- og strandarklima verða lýst. Í hesum sambandi verður dentur lagdur á veðurlagið og veðrið í Føroyum samanborið við aðrar lokalitetir.

Í undirvísingini verður eisini komið inn á klima- og plantubeltir. Ymisk lond og øki verða í stuttum viðgjørd í sambandi við fyritreytir fyri lívi og landbúnaði, m.a. við at nýta hydrotermfigurar, veðurlagskort ella líknandi.

Veðurlagsgass og mannaelvd ávirkan á veðurlagið er eisini partur av hesum kjarnaøkinum, herímillum avleiðingar, avbjóðingar og møguligar loysnir fyri mannaættina.

# 1.4. Fólkatalsfrøði og lendisumsiting

| C-stig | B-stig |
|---|---|
| - *Lendisumsiting og planlegging*<br>- *Infrakervi*<br>- *Fólkatalsfrøði og vinnumenning.* | |

*Landafrøði C-B*

Lendisumsiting verður sett í samband við, hvussu landaøki verða nýtt til bústaðir, landbúnað, vinnuøki og rekreativ øki. Dentur verður lagdur á týdningin av planlegging á lands-, kommunu- og býarskipanarstigi, og hvussu hetta ávirkar búseting og vinnulív. Føroyskir býir og øki verða lýst og samanborin við altjóða dømi. Næmingarnir kunnu arbeiða við kortum og planleggingarskjølum og læra at meta um lendisnýtslu og ávirkanina av broytingum í samfelagnum.

Infrakervi verður gjøgnumgingið, herímillum týdningurin av vegum, havnum, flogvøllum og neti fyri búseting og vinnu. Føroyska infrakervið verður lýst, og dømi verða givin um, hvussu broytingar hava ávirkað lokalsamfeløg. Næmingarnir læra at lesa kort og hagtøl og meta um samanhangin millum infrakervi og lokala og regionala menning.

Fólkatalsfrøði verður sett í samband við fólkatalslíkningina og greining av broytingum í fólkatali, aldurs- og kynsbýti, flyting og vinnumenning. Dentur verður lagdur á at brúka demografiskar dátur og at greina sambandið millum vinnumenning, fólkatalsbroytingar og urbanisering. Føroyskar og altjóða broytingar verða samanbornar, og avbjóðingar og møguleikar fyri burðardyggari menning verða viðgjørdar.

# 1.5. Havfrøði

| C-stig | B-stig |
|---|---|
| | - *Havfrøði, m.a. hvussu havið er uppbygt, og hvørjir streymar gera seg galdandi*<br>- *Firðir og sund í Føroyum*<br>- *Fiskivinna og alivinna* |

*Landafrøði B*

Í undirvísingini verður komið inn á bygnaðin av havinum, herímillum ymsu vatnløgini, brakkvatn og sjólag, og thermohalina rákið. Globalir og lokalir havstreymar, t.d. Golfstreymurin, verða gjøgnumgingnir, og dentur verður lagdur á týdningin av streymunum fyri veðurlag, lív og búskap. Føroyska havfrøðin verður sett í samband við veðurlagsbroytingar og fortreytir fyri fiskivinnu. Næmingarnir arbeiða við kortum, diagrammum og myndum av temperaturi og saltinnihaldi.

Firðir og sund í Føroyum verða lýst landafrøðiliga og havfrøðiliga. Streym- og botnviðurskifti í firðum verða gjøgnumgingin, og dentur verður lagdur á ávirkan á búseting, samferðslu og vinnulív. Næmingarnir arbeiða við sjókortum og dýpdarkortum og gera framløgur um nýtslu og avbjóðingar í úrvaldum firðum.

Komið verður inn á fiski- og alivinnu við serligum denti á teirra týdning fyri føroyskan búskap. Dentur verður lagdur á fiskasløg, fiskileiðir, fiskidagaskipan og kvotaskipan. Burðardygd og umhvørvisávirkan verða viðgjørd, og næmingarnir arbeiða við kortgreining og kjaki um framtíðina hjá vinnuni.

# 2. Førleikar

Fakligu førleikamálini eru orðað eftir besta próvtali, soleiðis at skilja, at um næmingurin hevur ognað sær førleikamálini væl og virðiliga, fær næmingurin próvtalið 12. Eins og kjarnaøkini umskarast ymsu fakligu førleikamálini, og í flestu førum verður arbeitt við fleiri førleikamálum samstundis.

Førleikarnir verða ognaðir gjøgnum undirvísingarevnini í kjarnaøkjunum umframt við fjølbroyttum arbeiðsháttum og samspæli við aðrar lærugreinir, tá ið tað ber til. Tí er umráðandi, at hugsað verður um fakligu førleikamálini saman við innihaldinum og arbeiðsháttunum, tá ið undirvísingin verður skipað.

Fakligu førleikamálini í alisfrøði kunnu flokkast í fýra yvirskipað náttúruvísindalig førleikaøki:

1. **Modelleringsførleikar**
2. **Empiriførleikar**
3. **Førleikar at miðla**
4. **Førleikar at seta í frásjón**

## 2.1. Faklig førleikamál – modelleringsførleikar

| C-stig | B-stig |
|---|---|
| • *at eyðmerkja og flokka rúmlig mynstur*<br>• *at velja út og nýta landafrøðilig kort og ritmyndir*<br>• *at skilja og nýta landafrøðilig modell og einføld støddfrøðilig modell* | • *at eyðmerkja og flokka rúmlig mynstur*<br>• *at velja út, nýta og meta um landafrøðilig kort og ritmyndir*<br>• *at skilja og kritiskt nýta landafrøðilig modell og einføld støddfrøðilig modell* |

*Landafrøði C-B*

Hesir førleikar snúgva seg um at duga at nýta ymisk landafrøðilig modell og háttaløg til at skipa og miðla innihald og samanhangir í lærugreinini, herímillum eisini faklig hugtøk.

Førleikin at eyðmerkja og flokka rúmlig mynstur snýr seg um, at næmingarnir skulu duga at nýta dátur og dátumyndir (m.a. kort), knýtt at fakligum hugtøkum og fakligari viðgerð. Málið er, at tey megna at kenna aftur og flokka t.d. ymisk plátutektonisk mørk, vindskipanir, landsløg o.a.

Landafrøðifaklig modell eru eitt av týdningarmiklastu háttaløgunum til at skilja landafrøðiligar tilgongdir. Flestu modell lýsa náttúruna einfaldari enn hon í veruleikanum er fyri at skapa yvirlit, og hetta skulu næmingarnir duga at taka støðu til. Dømi um einføld støddfrøðilig modell kunnu vera framskrivingar av hita og $CO_2$ í atmosferuni, flóð í heimshøvunum ella fólkatalsframskrivingar.

## 2.2. Faklig førleikamál – empiriførleikar

| C-stig | B-stig |
|---|---|
| • *at fremja empiriskt grundað arbeiði*<br>• *at finna og nýta landafrøðiligar keldur til at lýsa greiðsluevni og meta um keldurnar* | • *at greina og viðgera sambond og broytingar í náttúru og samfelag, herímillum við støði í egnum eygleiðingum og kanningum*<br>• *at leggja til rættis og fremja kanningar*<br>• *at finna og nýta landafrøðiligar keldur til at lýsa greiðsluevni og kritiskt meta um keldurnar* |

*Landafrøði C-B*

Á C-stigi skulu næmingarnir duga at loysa einfaldar empiriskar uppgávur, sum verða givnar teimum, t.d. at nýta atgongilig talgild kort og myndir og nýta viðkomandi hagfrøðiligt tilfar.

Á B-stigi skulu næmingarnir í ein ávísan mun gera royndararbeiði og feltarbeiði fyri sjálvir at ogna sær empiriskar kvantitativar og kvalitativar dátur, t.d. fara út í náttúruna og tekna eina skitsu av jarðfrøðini, sum síðan verður nýtt til at kanna okkurt víðari.

Við nógvu brúkaravinarligu kortunum og øðrum geofakligum amboðum, sum eru frítt atkomulig, er viðkomandi at læra næmingarnar at arbeiða við hesum, soleiðis at tey fáa eina talgilda albúgving í hesum økinum. Á C-stigi læra næmingarnir at arbeiða við einfaldum geofakligum forritum, har tey kunnu greina talgild kort eins og flog- og fylgisveinamyndir. Mong av hesum forritum hava GIS-líknandi amboð, har tað m.a. ber til at máta øki og fjarstøður o.a. Á B-stigi kann arbeitt verða við meira framkomnum funktiónum í amboðunum.

Í landafrøði snúgva greiðsluevni seg vanliga um at kortleggja, lýsa og greiða frá menningartilgongdum. Fortreytirnar fyri menning av støðum og broytingar yvir tíð kunnu verða tiknar upp í ymiskum høpi. Hetta kann t.d. gerast við at arbeiða við avsmeltingini av ísinum í Arktiska havinum, har næmingarnir út frá empiriskum dátum skulu greiða frá teimum afturkoplingsmekanismum, ið føra til avsmelting. Ávís støð hava náttúrugivin kor, ið eru serstøk fyri júst hesi støð. Dentur kann verða lagdur á aktuellar avbjóðingar, sum vísa seg hjá fólki, ið búgva í økinum. Á tann hátt kann arbeiðið við landafrøðiligum greiðsluevnum taka støði í viðkomandi evnum.

## 2.3. Faklig førleikamál – førleikar at miðla

| C-stig | B-stig |
|---|---|
| • *at nýta faklig hugtøk í lærugreinini*<br>• *at miðla og seta í frásjón landafrøðiliga vitan og samfelagskjak um landafrøðilig viðurskifti* | • *at nýta faklig hugtøk í lærugreinini*<br>• *at miðla og meta um fakliga vitan, greiningar og samfelagskjak um landafrøðilig viðurskifti* |

*Landafrøði C-B*

Førleikarnir at miðla fevna um at duga at miðla fakligt innihald bæði munnliga og skrivliga og at greiða frá á ein skipaðan og samanhangandi hátt við viðkomandi fakligum grundgevingum. Førleikarnir at miðla fevna eisini um viðkomandi nýtslu av fakligum hugtøkum, framsetingum og modellum.

Førleikarnir at miðla eru sostatt knýttir at málinum og samskiftisháttunum í lærugreinini og fevna tí eisini um førleikan at skjalfesta og viðgerða dátur. Dáturnar kunnu vera úr royndararbeiði hjá næminginunum sjálvum, ella koma frá øðrum keldum. Dáturnar kunnu verða framlagdar sum t.d. talvur, grafar og støddfrøðiligir formlar, og næmingarnir skulu arbeiða við ymiskum umboðanarháttum.

## 2.4. Faklig førleikamál – førleikar at seta í frásjón

| C-stig | B-stig |
|---|---|
| • *at fáa eyga á og greiða frá sambondum millum náttúru og samfelag*<br>• *at eyðmerkja landafrøðilig orsakarsambond og virknaðarsambond og tilgongdir á ymsum landafrøðiligum stigum* | • *at eyðmerkja og grundgeva fyri landafrøðiligum orsakarsambondum og virknaðarsambondum og tilgongdum á ymsum landafrøðiligum stigum*<br>• *at viðgera og seta í frásjón landafrøðiliga vitan* |

*Landafrøði C-B*

Førleikin at seta í frásjón, t.e. at perspektivera, fevnir bæði um førleikan at seta lærugreinina í frásjón innan fyri sjálva lærugreinina og út úr lærugreinini.

Frásjónargerð millum øki innan fyri lærugreinina snýr seg um at duga at taka uppí og flætta saman viðkomandi fakligar tættir í einum givnum greiðsluevni og at arbeiða á fleiri stigum í lærugreinini.

At seta í frásjón út úr lærugreinini kann fevna um fakligar metingar um, hvussu eitt umrøtt evni hevur havt ávirkan á náttúru ella samfelagslig viðurskifti, ella fakligar grundgevingar fyri landafrøðiligum orsakar- og virknaðarsambondum. Førleikar at seta í frásjón koma eisini til sjóndar, tá ið fakið verður nýtt í samspæli við aðrar lærugreinar. Tá verður sjálv lærugreinin sett í frásjón.

# 3. Eftirmeting og próvtøka

## 3.1. Eftirmeting og afturboðan

*Aðalmálið við allari undirvísing í øllum skúlaverkinum er, at allir næmingar áhaldandi læra og mennast, og tí eru reglulig eftirmeting og afturboðan um úrtøku og menning næminganna sameindur partur av allari undirvísing í øllum lærugreinum og á øllum stigum í skúlaverkinum.*

*Støðisnámsætlan*

Næmingarnir skulu javnan fáa afturboðan og leiðbeining í sínum arbeiði. Hetta kann eitt nú gerast við javnan at vísa á førleikamálini og at vísa á hóskandi hjálparmiðlar og arbeiðshættir, sum næmingarnir kunnu fáa gagn av. Afturboðanin kann vera munnlig ella skrivlig. Víst verður til leiðbeinandi skjalið "Leistur – eftirmeting og afturboðan", sum lærarar kunnu styðja seg til.

Umráðandi er, at lærarin leggur undirvísingina soleiðis til rættis, at næmingarnir fáa bestu fortreytir at læra. Tískil eiga undirvísingargongdir altíð at eftirmetast við tí fyri eyga at betra um undirvísingina.

Víst verður til skjalið "Leistur – undirvísingargongd".

## 3.2. Støðumet, ársmet og royndarmet

Næmingarnir skulu gjøgnum skúlaárið hava støðumet og ársmet eftir galdandi próvtalsstiga. Vanliga fáa næmingarnir støðumet fyri jólafrítíðina og fyri páskafrítíðina og so ársmet við skúlaárslok. Í sambandi við royndir skulu næmingarnir eisini hava royndarmet.

Metini verða givin við støði í fakligu førleikamálunum og støðisførleikunum. Støðu- og ársmetini eru sostatt meting lærarans av, í hvønn mun næmingarnir í framdum avrikum lúka sett førleikamál, samanborið við framda undirvísing. Royndarmetini verða givin við støði í ávísum uppgávuorðingum.

Støðu- og ársmetini skulu lýsa fakliga støðið í løtuni, tá ið metini verða givin. Talan eigur sostatt ikki at vera um eina meting yvir eitt longri tíðarskeið ella eitt miðal av fleiri avrikum.

Atburður, uppmøting og arbeiðssemi eiga í sjálvum sær ikki at vera tikin við í støðu- og ársmetini.

Ársmetini seinasta árið eru endalig og verða sett í prógv næminganna.

## 3.3. Munnlig próvtøka á C-stigi

*Hildin verður ein munnlig próvtøka. Próvhoyringin varir 25 minuttir, íroknað próvdøming. Fyrireikingartíðin er 25 minuttir, íroknað útflýggjan av tilfari og leiðbeining.*

*Próvtøkuspurningarnir verða settir við støði í førleikamálunum og kjarnaøkjunum í lærugreinini. Próvhoyringin er ein faklig samrøða millum próvtakara og próvhoyrara, og tekur samrøðan støði í*

*framløgu próvtakarans av ókendum tilfari og próvtøkuspurningi, sum próvtakarin hevur arbeitt við í fyrireikingartíðini. Í fyrireikingini kann próvtakarin brúka alt tilfar frá undirvísingini. Undir próvhoyringini kann próvtakarin einans brúka notur, sum hann/hon hevur gjørt í fyrireikingartíðini, próvtøkuspurningin og møguliga útgerð til royndararbeiði.*

*Próvtøkuspurningarnir skulu vera neyvlýsandi og hava undirspurningar umframt fylgiskjøl, ið ikki hava verið nýtt í undirvísingini. Próvtøkuspurningarnir skulu skipast soleiðis, at próvtakarin fær møguleika at vísa eina røð av teimum førleikum, hann/hon hevur útvegað sær í undirvísingini. Tað er próvtakarans egna ábyrgd at meta um, hvat lisið tilfar kann verða tikið við í viðgerðina, men próvtakarin kann verða spurdur um alt, ið er lisið gjøgnum árið.*

*Sama próvtøkutilfar kann í mesta lagi verða nýtt tríggjar ferðir í sama próvtøkuflokki.*

*Landafrøði C*

**C-stig**

Próvhoyrarin ger próvtøkuspurningarnar, sum skulu verða sendir próvdómaranum í seinasta lagi 5 yrkadagar fyri próvtøkuna. Samlaða talið á próvtøkuspurningum skal í minsta lagi vera talið á próvtakarum + trý. Sami próvtøkuspurningur kann verða nýttur tríggjar ferðir, tó kunnu fylgiskjøl verða nýtt oftari. Um próvtøkan røkkur um fleiri dagar, skulu teir próvtøkuspurningar, sum eru nýttir fyrsta dagin, ikki leggjast aftur saman við próvtøkuspurningunum annan próvtøkudagin.

Próvtøkuspurningarnir skulu hava yvirskrift, har tað fakliga økið í próvtøkuspurninginum verður avmarkað. Evnið/økið skal hvørki vera ov smalt ella ov vítt í fakligum innihaldi. Umframt yvirskriftina kunnu spurningarnir fevna um eina stutta lýsing av økinum, sum vísir á fleiri møguligar fakligar leiðir í uppgávuni.

Eitt ella fleiri fylgiskjøl skulu fylgja við próvtøkuspurninginum og verða tikin við í próvhoyringina. Partar av fylgiskjølunum skulu ikki hava verið nýttir í undirvísingini. Fylgiskjølini kunnu vera eitt nú modell, talvur, grafar og stuttir tekstir. Fylgiskjølini skulu í vavi og torleikastigi samsvara við fyrireikingartíðina, sum er 25 minuttir.

Próvtøkan byrjar við, at próvtakarin, við støði í hjálagda tilfarinum, leggur fram í mesta lagi 10 minuttir. Eftir hetta eigur próvhoyringin ikki at vera ein einrøða hjá próvtakaranum, men skulu próvtakarin og próvhaldarin hava eina fakliga samrøðu, tó uttan at forðað verður fyri sjálvstøðugum avriki. Samrøðan skal taka uppí viðkomandi partar av kjarnaøkjunum, og próvtakarin skal fáa høvi at vísa vitan, fatan og heildarinnlit. Samrøðan skal eisini kunna avdúka møguligar manglar. Hetta er galdandi uttan mun til fakliga støðið hjá próvtakaranum.

**Hjálparmiðlar:** Í fyrireikingarhølinum kann próvtakarin nýta alt undirvísingartilfar sum hjálparmiðlar. Próvtakarin kann ikki reika frítt á netinum, men hann/hon kann brúka netborið undirvísingartilfar. Próvtakarin hevur ikki loyvi at nýta vitlíki ella at samskifta við onnur í fyrireikingartíðini.

### 3.3.1. Dømingargrundarlag – munnlig próvtøka

*Í dømingini verður dentur lagdur á, í hvønn mun próvtakarin lýkur faklig mál, sum eru sett í lærugreinini. Dentur verður serliga lagdur á evni próvtakarans at:*

- *orða seg neyvt og greitt og at nýta fakligu hugtøkini í lærugreinini*
- *nýta vitan og háttaløg í lærugreinini til at lýsa einføld landafrøðilig greiðsluevni*
- *taka givin fylgiskjøl og onnur týðandi landafrøðilig evni við í fakligu samrøðuna*
- *seta sína fakligu vitan í frásjón.*

*Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki próvtakarans.*

*Landafrøði C*

Væntast kann ikki, at einstaka próvtøkuuppgávan til munnligu próvtøkuna fevnir javnt um øll tey fakligu førleikamálini og alt dømingargrundarlagið. Heldur ikki kann væntast, at framløgan hjá einstaka próvtakaranum fer at viðgera øll faklig førleikamál í sama mun. Tá ið próvtøkan verður mett, er týdningarmikið at leggja dent á tað, sum próvtakarin dugir, og ikki einans á feilir og manglar. Heildarmetingin hevur størri týdning enn einstakir smálutir.

At lesa upp úr notum og bókum telur niður í metingini, men tað er í lagi at taka uppí viðkomandi grafar, figurar og tabellir úr frágreiðingum ella øðrum tilfari til at dýpa fylgiskjølini.

### 3.3.2. Próvtalslýsing – munnlig próvtøka

| Próvtal | Heiti | Lýsing |
|---|---|---|
| **12** | Framúr gott | Framløgan er væl skipað, og próvtakarin málber seg greitt og neyvt við landafrøðiligum yrkismáli.<br>Próvtakarin vísir í fakligu samrøðuni víðfevndan kunnleika til vitan, hugtøk og arbeiðshættir í lærugreinini, umframt breiða fatan av tilfarinum.<br>Próvtakarin dregur inn fakliga viðkomandi tættir og tulkar og greinar sjálvstøðugt próvtøkutilfarið, har nærum øll týdningarmikil viðurskifti verða tikin við.<br>Próvtakarin megnar sjálvstøðugt at draga viðkomandi fakliga vitan inn í frásjónargerðina og at viðgera viðkomandi landafrøðiligar tættir í kjaki um greiðsluevni í lærugreinini. |
| **7** | Gott | Framløgan er samanhangandi, og próvtakarin málber seg í ávísan mun greitt og nýtir landafrøðiligt yrkismál. |

| | | |
|---|---|---|
| | | Próvtakarin vísir í fakligu samrøðuni góðan kunnleika til vitan, hugtøk og arbeiðshættir í lærugreinini, umframt við nøkrum manglum kunnleika til tilfarið.<br><br>Próvtakarin dregur í ávísan mun inn fakliga viðkomandi tættir og tulkar og greinar í ávísan mun próvtøkutilfarið, men við manglum.<br><br>Próvtakarin megnar, tó við manglum, at draga viðkomandi fakliga vitan inn í frásjónargerðina og at viðgera viðkomandi landafrøðiligar tættir í kjaki um greiðsluevni í lærugreinini. |
| **02** | Nøktandi | Framløgan er ósamanhangandi, og próvtakarin málber seg ógreitt og óneyvt, har nýtslan av landafrøðiligum yrkismáli hevur fleiri týðandi manglar.<br><br>Próvtakarin vísir í fakligu samrøðuni skerdan kunnleika til vitan, hugtøk og arbeiðshættir í lærugreinini og í lítlan mun kunnleika til tilfarið.<br><br>Próvtakarin dregur í lítlan mun inn fakliga viðkomandi tættir og tulkar og greinar próvtøkutilfarið ósjálvstøðugt og óneyvt.<br><br>Próvtakarin megnar bert í skerdan mun og við týðandi manglum at draga viðkomandi fakliga vitan inn í frásjónargerðina og kjak um greiðsluevni í lærugreinini. |

# 3.4. Munnlig próvtøka á B-stigi

*Hildin verður ein munnlig próvtøka. Próvhoyringin varir 30 minuttir, íroknað próvdøming. Fyrireikingartíðin er 30 minuttir, íroknað útflýggjan av tilfari og leiðbeining.*

*Próvtøkuspurningarnir verða settir við støði í førleikamálunum og kjarnaøkjunum í lærugreinini. Próvhoyringin er ein faklig samtala millum próvtakara og próvhoyrara, og tekur samtalan støði í framløgu próvtakarans av ókendum tilfari og próvtøkuspurningi, sum próvtakarin hevur arbeitt við í fyrireikingartíðini. Í fyrireikingini kann próvtakarin brúka alt tilfar frá undirvísingini. Undir próvhoyringini kann próvtakarin einans brúka notur, sum hann/hon hevur gjørt í fyrireikingartíðini, próvtøkuspurningin og møguliga útgerð til royndararbeiði.*

*Próvtøkuspurningarnir skulu vera neyvlýsandi og hava undirspurningar umframt fylgiskjøl, ið ikki hava verið nýtt í undirvísingini. Próvtøkuspurningarnir skulu skipast soleiðis, at próvtakarin fær møguleika at vísa eina røð av teimum førleikum, hann/hon hevur útvegað sær í undirvísingini. Tað er próvtakarans egna ábyrgd at meta um, hvat lisið tilfar kann verða tikið við upp í viðgerðina, men próvtakarin kann verða spurdur um alt, ið er lisið gjøgnum árið.*

*Sama próvtøkutilfar kann í mesta lagi verða nýtt tríggjar ferðir í sama próvtøkuflokki.*

*Landafrøði B*

**B-stig**

Próvhoyrarin ger próvtøkuspurningarnar, sum skulu verða sendir próvdómaranum í seinasta lagi 5 yrkadagar fyri próvtøkuna. Samlaða talið á próvtøkuspurningum skal í minsta lagi vera talið á próvtakarum + trý. Sami próvtøkuspurningur kann verða nýttur tríggjar ferðir, tó kunnu fylgiskjøl verða nýtt oftari. Um próvtøkan røkkur um fleiri dagar, skulu teir próvtøkuspurningar, sum eru nýttir fyrsta dagin, ikki leggjast aftur saman við próvtøkuspurningunum annan próvtøkudagin.

Próvtøkuspurningarnir skulu hava yvirskrift, har tað fakliga økið í próvtøkuspurninginum verður avmarkað. Evnið/økið skal hvørki vera ov smalt ella ov vítt í fakligum innihaldi. Umframt yvirskriftina kunnu spurningarnir fevna um eina stutta lýsing av økinum, sum vísir á fleiri møguligar fakligar leiðir í uppgávuni.

Eitt ella fleiri fylgiskjøl skulu fylgja við próvtøkuspurninginum og verða tikin við í próvhoyringina. Partar av fylgiskjølunum skulu ikki hava verið nýttir í undirvísingini. Fylgiskjølini kunnu vera eitt nú modell, talvur, grafar og stuttir tekstir. Fylgiskjølini skulu í vavi og torleikastigi samsvara við fyrireikingartíðina, sum er 30 minuttir.

Próvtøkan byrjar við, at próvtakarin, við støði í hjálagda tilfarinum, leggur fram í mesta lagi 10 minuttir. Eftir hetta eigur próvhoyringin ikki at vera ein einrøða hjá próvtakaranum, men skulu próvtakarin og próvhaldarin hava eina fakliga samrøðu, tó uttan at forðað verður fyri sjálvstøðugum avriki. Samrøðan skal taka uppí viðkomandi partar av kjarnaøkjunum, og próvtakarin skal fáa høvi at vísa vitan, fatan og heildarinnlit. Samrøðan skal eisini kunna avdúka møguligar manglar. Hetta er galdandi uttan mun til fakliga støðið hjá próvtakaranum.

**Hjálparmiðlar:** Í fyrireikingarhølinum kann próvtakarin nýta alt undirvísingartilfar sum hjálparmiðlar. Próvtakarin kann ikki reika frítt á netinum, men hann/hon kann brúka netborið undirvísingartilfar. Próvtakarin hevur ikki loyvi at nýta vitlíki ella at samskifta við onnur í fyrireikingartíðini.

## 3.4.1. Dømingargrundarlag – munnlig próvtøka

*Í dømingini verður dentur lagdur á, í hvønn mun próvtakarin lýkur faklig mál, sum eru sett í lærugreinini. Dentur verður serliga lagdur á evni próvtakarans at:*

- *orða seg neyvt og greitt og at nýta fakligu hugtøkini í lærugreinini*
- *nýta vitan og háttaløg í lærugreinini til at lýsa einføld landafrøðilig greiðsluevni*
- *taka givin fylgiskjøl og onnur týðandi landafrøðilig evni við í fakligu samrøðuna*
- *seta sína fakligu vitan í frásjón.*

*Givið verður eitt próvtal við støði í einari heildarmeting av samlaða avriki próvtakarans.*

*Landafrøði B*

Væntast kann ikki, at einstaka próvtøkuuppgávan til munnligu próvtøkuna fevnir javnt um øll tey fakligu førleikamálini og alt dømingargrundarlagið. Heldur ikki kann væntast, at framløgan hjá

einstaka próvtakaranum fer at viðgera øll faklig førleikamál í sama mun. Tá ið próvtøkan verður mett, er týdningarmikið at leggja dent á tað, sum próvtakarin dugir, og ikki einans á feilir og manglar. Heildarmetingin hevur størri týdning enn einstakir smálutir.

At lesa upp úr notum, bókum, skrivligum innlatingum og øðrum telur niður í metingini, men tað er í lagi at taka uppí viðkomandi grafar, figurar og tabellir úr frágreiðingum ella øðrum tilfari til at dýpa fylgiskjølini.

### 3.4.2. Próvtalslýsing – munnlig próvtøka

| Próvtal | Heiti | Lýsing |
|---|---|---|
| **12** | Framúr gott | Framløgan er væl skipað, og próvtakarin málber seg greitt og neyvt við landafrøðiligum yrkismáli.<br><br>Próvtakarin vísir í fakligu samrøðuni víðfevndan kunnleika til vitan, hugtøk og arbeiðshættir í lærugreinini, umframt breiða fatan av tilfarinum.<br><br>Próvtakarin dregur inn fakliga viðkomandi tættir og tulkar og greinar sjálvstøðugt próvtøkutilfarið, har nærum øll týdningarmikil viðurskifti verða tikin við.<br><br>Próvtakarin megnar sjálvstøðugt at draga viðkomandi fakliga vitan inn í frásjónargerðina og at viðgera viðkomandi landafrøðiligar tættir í kjaki um greiðsluevni í lærugreinini. |
| **7** | Gott | Framløgan er samanhangandi, og próvtakarin málber seg í ávísan mun greitt og nýtir landafrøðiligt yrkismál.<br><br>Próvtakarin vísir í fakligu samrøðuni góðan kunnleika til vitan, hugtøk og arbeiðshættir í lærugreinini, umframt við nøkrum manglum kunnleika til tilfarið.<br><br>Próvtakarin dregur í ávísan mun inn fakliga viðkomandi tættir og tulkar og greinar í ávísan mun próvtøkutilfarið, men við manglum.<br><br>Próvtakarin megnar, tó við manglum, at draga viðkomandi fakliga vitan inn í frásjónargerðina og at viðgera viðkomandi landafrøðiligar tættir í kjaki um greiðsluevni í lærugreinini. |
| **02** | Nøktandi | Framløgan er ósamanhangandi, og próvtakarin málber seg ógreitt og óneyvt, har nýtslan av landafrøðiligum yrkismáli hevur fleiri týðandi manglar.<br><br>Próvtakarin vísir í fakligu samrøðuni skerdan kunnleika til vitan, hugtøk og arbeiðshættir í lærugreinini og í lítlan mun kunnleika til tilfarið. |

| | | |
|---|---|---|
| | | Próvtakarin dregur í lítlan mun inn fakliga viðkomandi tættir og tulkar og greinar próvtøkutilfarið ósjálvstøðugt og óneyvt.<br><br>Próvtakarin megnar bert í skerdan mun og við týðandi manglum at draga viðkomandi fakliga vitan inn í frásjónargerðina og kjak um greiðsluevni í lærugreinini. |

# 4. Ársætlan og undirvísingargongdir

Tíðliga í skúlaárinum skal ársætlanin fyri lærugreinina vera tøk. Ársætlanin er eitt yvirskipað skjal við yvirliti yvir ráðlagdar undirvísingargongdir fyri skúlaárið.

Lærarin skal so hvørt í undirvísingini gera ítøkiligar lýsingar av hildnum undirvísingargongdum. Nakað fyri skúlaárslok skulu undirvísingargongdirnar fyri farna skúlaár skrivast lidnar. Endamálið við undirvísingargongdunum er at skjalfesta, at undirvísingin hevur lokið krøvini í galdandi námsætlanum. Undirvísingargongdirnar eru eisini støði undir munnligu próvtøkuni og verða latnar próvdómara.

Víst verður til skjølini: “Leistur – ársætlan fyri lærugrein” og “Leistur – undirvísingargongd”.